


# P/F Vága Floghavn søkir eftir projektmedarbeiðara

Projektið við at leingja flogvøllin er nú boðið út, og projektering av farstøð v.m. stendur fyri framman, samstundis sum arbeiðið uppá leingingina verður framt. Í hesum sambandi hevur Vága Floghavn tørv á einum projektmedarbeiðara á byggiharrasíðuni.

Projektmedarbeiðarin kemur í samstarvi við projektsamskiparan at taka sær av

» at fylgja arbeiðinum við leinging av vøllinum
» at samstarva og samskipa á markamótum við myndugleikar, jørðeigarar, rakstrarpartin av Vága Floghavn o.o., so projektið kann ótarnað ganga sína gongd
» at tryggja at neyðugar avtalur og loyvi eru tøk, so hvørt sum tørvur er á teimum
» at hava yvirskipað eftirlit við arbeiðinum í samstarvi við byggileiðsluna
» at skipa fyri, at allar avtalur við arbeiðstakaran verða gjørdar til tíðina
» regluliga rapportering um gongdina
» umframt aðrar uppgávur í sambandi við virksemið hjá Vága Floghavn

**Førleikakrøv**
Tann rætti umsøkjarin

» hevur útbúgving sum verkfrøðingur ella byggifrøðingur innan bygging/anlegg, ella hevur aðra hóskandi útbúgving
» hevur góð samstarvsevni og dugir at arbeiða sjálvstøðugt
» hevur royndir frá privata ella almenna arbeiðsmarknaðinum innan leiðslu og eftirlit av húsbygging og anlegsarbeiði, gjarna frá byggiharrasíðuni
» hevur kunnleika til føroyskt, danskt og enskt mál

**Løn og setanartreytir**
Miðað verður ímóti at seta starvið 1. apríl 2010, ella eftir nærri avtalu. Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Einar Brimnes á telefon 354400 ella teldupost eibr@floghavn.fo

Umsóknir saman við prógvum, C.V. og øðrum skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 01. februar 2010. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði og skulu sendast til:

Dávid Reinert Hansen,
P/F Vága Floghavn
380 Sørvágur

Ella við neyðugum fylgiskjølum til teldupost drh@floghavn.fo




***Föroya Bjór bryggjar vistfröðiligt öl.*** *Tað er vorið meira og meira vanligt, at tú sært vistfröðiligar vörur í handlunum. Aðrastaðni sæst eisini vistfröðiligt öl. Föroya Bjór er nú farið at royna hendan möguleikan, og hevur í samráð við Vottanarstofuna Tún, (altjóða viðurkend vistfröðilig váttanarstova) bryggjað eina vistfröðiliga öl:* ***ORGANIC LIGHT LAGER.*** *Tilfarið er gott föroyskt vatn, vistfröðiligt malt og vistfröðilig humla. Tað er umráðandi at kunna prógva, at vanlig framleiðsla og vistfröðilig framleiðsla kann haldast atskilt, og at kunna prógva at rávöran er verðuliga vistfröðilig. Hetta hevur Vottunarstofan Tún kannað og góðkent. Tað nýggja ölið er ein vælsmakkandi lött öl, vælegnað sum tostadrykkur, og eisini aftur við mati. Alkoholinnihaldið er 2.8% abv. Tað nýggja ölið er væl móttikið. og tað kann hugsast at okkurt annað vistfröðiligt öl kemur á marknaðin.*